UTTAN ÚR HEIMI

# 20 ár síðani Tsjernobylvanlukkuna

**Í dag eru 20 ár, síðani tann fjórði reaktorurin á kjarnorkuverkinum í Tsjernobyl sprongdist. Sambært stjóranum á verkinum er sannleikin um vanlukkuna ongantíð komin fram.**



TSJERNOBYL
*Árni Joensen*
*fartekst@mail.dk*

Tað, sum ikki skuldi henda, hendi um náttina tann 26. apríl í 1986. Klokkan 01.23 fór ávaringarskipanin á kjarnorkuverkinum Tsjernobyl í Ukraina í gongd. Ein minutt seinni sprongdist tann fjórði reaktorurin á verkinum.

Vanlukkan fekk ómetaliga stórar aveliðingar, og um alt Evropa varð stúrt fyri geiðslavirknari dálking. Enn tann dag í dag, 20 ár seinni, veit eingin við vissu, hvørjar avleiðingarnar veruliga vóru ella eru, men tey kønu halda, at vanlukkan hevur kostað einastaðni ímillum 5.000 og 100.000 mannalív, meðan túsundtals onnur stríðast við sjúkur og likamlig lýti, ið stóðust av vanlukkuni.

Men hví hendi tað?

### Ikki allur sannleikin

Tann 26. apríl í 1986 var tann 37 ára gamli Viktor Bryukhanov stjóri á verkinum í Tsjernobyl. Í dag er hann 57 ára gamal, og í einari samrøðu við russiska tíðarritið Profil heldur hann uppá, at sannleikin um heimsins ringastu kjarnorkuvanlukku er ongantíð komin fram.

–Vísindafólkini, verkfrøðingarnir og ákæruvaldið vardu áhugamálini hjá kjarnorkuídnaðinum, og við lygnum duldu tey ta veruligu orsøkina til vanlukkuna, sigur Viktor Bryukhanov, sum sjálvur fekk tíggju ára fongsul fyri tað, sum hent var.

Fleiri serfrøðingar halda, at tann fjórði reaktorurin sprongdist, tí nakrar rivur vóru í honum, og menniskjalig mistøk gjørdu eisini sítt. Sjálvur vil táverandi stjórin á verkinum ikki siga, hví vanlukkan hendi, men hann viðgongur, at starvsfólkini gjørdu nøkur mistøk, beint áðrenn reaktorurin sprongdist. Men mistøkini og rivurnar eru ikki allur sannleikin, sigur hann.

### Kann henda aftur

Viktor Bryukhanov sigur, at fleiri kjarnorkuverk í Eysturevropa brúka framvegis reaktorar av tí slagnum sum tann, ið sprongdist fyri 20 árum síðani. Samstundis verða nýggj kjarnorkuverk bygd í Evropa, USA og Kina. Hann hevur fremstafingur á lofti:

– Tað, sum hendi í Tsjernobyl, kann henda aftur, og tann næsta vanlukkan kann gerast uppaftur verri, og tí hevur heimurin rætt til at fáa at vita allan sannleikan um Tsjernobyl-vanlukkuna.

Fyrrverandi stjórin á Tsjernobyl-verkinum er ikki í iva um, at tað er ikki bara Ukraina, sum dylir sannleikan. Onnur lond dylja eisini sannleikan um vanlukkur á kjarnorkuverkum, sigur hann við Profil.

### Mintust tey deyðu

Stutt fyri klokkan hálvgum tvey í nátt hoyrdust 20 sløg frá einari kirkjuklokku í ukrainska høvuðsstaðnum Kiev til minnis um, at 20 áru eru liðin síðani vanlukkuna. Uttan fyri kirkjuna vóru fleiri hundrað fólk komin at leggja blómur og at tendra ljós til minnis um tey, sum doyðu av vanlukkuni.

Viktor Jusjtjenko, forseti, var til minningarhaldið, har hann legði krans til minnis um teir, sum lótu lív í ruddingararbeiðinum aftan á vanlukkuna. Mánadagin bað hann altjóða samfelagið um hjálp. Sambært forsetanum verður ruddingararbeiðið ikki liðugt fyrr enn í 2015, og tá hevur tað kostað Ukraina 170 milliardir dollarar ella eina billión krónur.

## Bensin ov dýrt í USA



*Bensinið er ov dýrt í USA.*

Tann høgi oljuprísurin hevur gjørt tað ov dýrt hjá amerikonskum bileigarum at fylla tangan, heldur George W. Bush, forseti.

Í einari røðu í gjárkvøldið segði hann, at stjórnin hevur gjørt av at senda meiri bensin á marknaðin fyri at halda príshækkingini niðri. Vanliga hevur USA nógv bensin á goymslu, men forsetin segði, at hann er til reiðar at avmarka goymslurnar og at koyra bensinið á marknaðin ístaðin fyri. Tað fær kortini onga ávirkan á amerikanska bensinprísin í bræði, tí sambært forsetanum fáa bileigararnir ikki ágóðan fyrr enn í heyst. Politiskir eygleiðarar halda, at avgerðin hjá Bush er ein roynd at bøta um sítt umdømi ímillum veljararnar.

Marknaðarserfrøðingar siga við Reuter, at avgerðin hjá amerikonsku stjórnini kemur oljuvinnuni dátt við, og teir vænta, at partabrøvini í oljufeløgunum fara at fella í virði. Avgerðin fer væntandi eisini at tálma oljuprísinum, sum hevur ligið um 73 dollarar fyri tunnuna teir seinastu dagarnar.

## Panama-veitin ov smøl

Myndugleikarnir í Panama hava gjørt av at nútímansgera Panamaveitina, so størri skip kunnu sigla ígjøgnum hana.

Martin Torrijos, forseti, sigur, at arbeiðið fer at kosta einar 30 milliardir krónur, og at tað ætlandi verður liðugt í 2014, tí tá eru hundrað ár, síðani veitin bleiv tikin í nýtslu. Arbeiðið fer ikki at órógva ferðsluna ígjøgnum veitina, tí ætlanin er at gera slúsur við síðuna av verandi veit, sigur Martin Torrijos við AP og leggur afturat, at tá arbeiðið er liðugt, kunnu heimsins størstu skip sigla ígjøgnum Panamaveitina.

Panama-veitin varð í sínari tíð roknað sum eitt satt meistaraverk innan verkfrøði, sjálvt um byggingin kravdi 23.000 mannalív. Men menn hildu veitina vera prísin verda, tí nú sluppu skip frá at sigla um tað vandamikla Kap Horn, tá tey skuldu úr Atlantshavinum í Kyrrahavið ella hinvegin.

## Óttast borgarakríggj

Vandi er fyri, at borgarakríggið í Sri Lanka fer at kykna aftur eftir eina miseydnaða morðroynd ímóti landsins herovasta í gjár. Herovastin, Sarath Fonseka, varð illa særdur av einari sjálvmorðsbumbu, og níggju av lívverjum hansara doyðu.

Stutt eftir atsóknina bumbaði stjórnarherurin mál sunnan fyri býin Trincomalee. Sviin Ulf Henricsson, sum er leiðari hjá teimum norðurlendsku eygleiðarunum í Sri Lanka, sigur við svensku tíðindastovuna TT, at bumbuálopið var ivaleyst hevnd fyri álopið á herovastan. Hann sigur seg stúra fyri, at hetta kann gera enda á teirri skroypiligu friðaravtaluni millum stjórnina og teir tamilsku loysingarmenninar har norðuri í landinum.

Norskir diplomatar hava í seinastuni roynt at fáa partarnar at binda frið, men Alf Morten Jerve, sum er serkønur í srilankiskum viðurskiftum, sigur við Aftenposten í dag, at útlitini fyri friði eru vánalig nú. Tvørturímóti væntar hann, at borgarakríggið fer at kykna aftur.